

*Petur var sera hugtikin av hvussu spaniólar fóru við teimum deyðu. Her er hann í einum kirkjugarði har kisturnar eru stáplaðar oman á hvørja aðra og blómur standa uttanfyri.*

varð ikki vanliga ringt millum londini. Samskiftið gekk fyri seg í brøvum , sigur Petur Andreasen.

### Blaðteknari í Godthaab

Petur er góður teknari og okkurt hava hann og Óli P. lært á kunsthåndverkaraskúlanum, tí í sjeytiárunum hevur Petur týdningamiklu uppgávuna at gera forsíðuna á óhefta grønlendska vikublaðnum Sermitsiak. Forsíðan var ein tekning av onkrum framstandandi persóni í samfelagnum og serliga onkrum politiskum persóni.

- Tá eg kom til Grønlands var ongin politikkur. Grønlendingar vóru púra ótilvitaðir um politik, og kendu ikki munin á høgru og vinstru. Eg minnist, at eg plagdi at forklára fólki, hvat munurin var á høgru og vinstru í politikki. So hendi tað, at grønlendingar sum høvdu tikið sær útbúgving í Danmark, og sum høvdu verið politiskt virknir í lestrartíðini ,fluttu aftur til Grønlands og politiska landslagið, sum vit kenna tað í dag byrjaði spakuliga at trína fram.

- Har trinu menn fram sum Jonathan Motzfeldt, Lars Chemnits, Moses Olsen, Lars Emil Johansen og Otto Stenholdt og aðrir. Hetta vóru alt menn, sum eg lærdi at kenna, og teir karikeraði eg á forsíðuni í Sermitsiak. Eg helt fram við hesum virki eina tíð, men hetta var stríggið at finna eitt nýtt evni til hvørja viku, og at enda gavst eg, sigur Petur Andreasen.

### Virkin í vinnulívinum

Petur var miðskeiðis í sjeytiárunum við at byggja tann fyrsta grønlendska rækjutrolaran. Hann kallaðist Qaasiut. Føroyingar høvdu tá í nøkur ár fiskað rækjur í Grønlandi. Teir stovnaðu eitt partafelag og fingu góða figging úr Erhvervsfonden í Danmark. Eigararnir í vóru fýra føroyingar, ein danskari og ein grønlendingur.

- Trolarin fór til fiskiskap í 1978 og fiskaði fyrsta árið 1000 tons. Tað varð hildið at vera rættuliga gott tá. Prísurin á rækjum var methøgur um hetta mundi og manningin vann gylt. Tann eina mánan tjenti skiparin 210.000 krónur. Fyrsti skiparin var Jens Ingolf Poulsen úr Skopun.

- Eg fór heim aftur tvey ár seinni til Føroyar og seldi mín part í felagnum.

### Á egnari teknistovu

Í 1979 flytir Petur heim aftur til Føroyar og setir á stovn egna teknistovu.

- Eg hevði útbúgving sum byggifrøðingur, og nú fór eg endiliga av álvara undir tað sum hevði mín stóra áhuga, at gera trýdimensionell modell av byggiætlanum, sum skuldi fremjast í Føroyum. Ein partur av arbeiðinum var eisini at tekna sethús. Í áttatiárunum var nógv at gera í Føroyum, men í 1990 kemur tann so væl kenda søgan, at alt samfelagið steðgaði upp og eg varð noyddur at leggja kongin. Teknistovan lat aftur. Hetta var ein torfør støða at vera í. Eg var 56 ára gamal og tað er ikki lætt at fáa starv, tá ið tú er komin so høgt upp í árini. Eg seldi húsini í Føroyum og fór til Danmarkar at leita mær arbeiði. Tað gekk ikki, síðan fóru eg og konan Hildigunn suðureftir. Vit koyrdu gjøgnum Europa og endaðu í Suðurspaniu. Her funnu vit eina íbúð og settu okkum niður.

### Útisetin

Næstu tíggju árini fram til ár 2000 búgva Petur og Hildigunn í Suðurspaniu á sólstrondini við útsýni yvir Gibraltar og afrikanska meginlandið.

- Hvat er tað sum hevur gjørt meg til útiseta í útvið 30 ár av mínum lívi. Eg havi altíð verið forvitin og kent spenning av tí sum hevur verið uttanfyri landoddarnar. Eg haldi tað er sunt at ferðast og havi altíð droymt um at síggja nakað annað. Eg átti ein mammubeiggja, sum búði meginpartin av ævini í Kanada, og sum livdi eina ævinyrtilveru. Hann hevur verið mín fyrimynd. Hann var timburmaður, og eg droymdi um at sleppa at smíðja saman við honum. Tað var faktisk lagnan sum rak hann út í heim í tjúgunum. Hann var júst giftur og hevði bygt hús í Sørvági úti á Bakka. Konan var við barn og doyði saman við barninum á barsilssong og so hevði hann einki at vera heima eftir, sigur Petur Andreasen.

Hóast lítið og einki var at gera niðri í Spaniu, so trivust tey væl har og Petur fann seg sjálvan. Hann hevði keypt barndómsheimi í Vestmanna og hetta saman við at mamman var vorðin gomul dró heima aftur. Var tað ikki so, so hevði hann kanska verið búgvandi í Spaniu.

- Útferðin til Spaniu gav okkum ikki færri enn tíggju túrar aftur og fram í egnum bili millum Føroyar og Spaniu, og vit royndu so ymiskar farleiðir sum gjørligt, fyri at síggja so nógv av Europa á hesum ferður. Tað var sera áhugavert, sigur hann.

### Okkara ósømiligu kirkjugarðssiðir

Eg var hugtikin av sponsku mentanini og hvussu tey livdu har og serliga væl dámdi mær hvussu tey fóru við teimum deyðu. Føroyski hátturin at pota deyð niður í váta, kalda og súra mold kann tykjast mongum vullgerur. Í Spaniu er vanligt at gravseta tey deyðu í gravkømurum í fleiri hæddum og lið um lið, hetta kennist sera hugnaligt og fjálgt, tá ið tú vitjar tey, ið farin eru. Á hendan hátt sparir tú pláss og tú kemur tættari at teimum deyðu. Hetta er ein nógv meira náttúrligur háttur. Eg haldi at føroyingar áttu at gjørt sum spaniólar. At brenna lík er eisini ósømiligt. Hevði tú vilja verið brendur? spyr Petur.

### Heitur ES maður

Petur var staddur í 1Grønlandi, tá íð Grønland fór upp í ES fyrst í sjeytiárunum og hann var eisini staddur har, tá ið teir meldaðu seg úr aftur ES.

- Eg haldi tað var skeivt av grønlendingum at melda seg út og føroyingar skuldu eisini verið í ES. Tað varð eitt øgiligt virksemi í Grønlandi so skjótt teir vóru komnir upp í ES. Tað hevði saktans borið til at samrátt seg til eina brúkiliga fiskiveiðuavtalu, og vit høvdu fingið so øgiliga nógvar aðrar fyrimunir at verið í ES samstarvinum. Hetta er heilt láturligt at síggja hvussu føroyingar á allan hugsandi annan hátt royna at náa ES marknaðinum við eitt nú EFTA, í staðin fyri at melda seg beinleiðis inn, vit hava ongar trupulleikar at gerast eitt ES land.

- Eg var eisini staddur í Spania, tá ið teir meldaðu seg inn í ES og skal lova tykkum fyri, at tá fór nakað at henda í Spaniu. Tað var alt steðgað upp áðrenn og spaniólar eru í dag ovurfegnir um at vera ein partur av samveldinum, sigur Petur.

Uttanfyri er stormur av útnyrðingi. Áin í Gassadali, Gassá, sleppur ikki at renna oman, vatnið verður fýst upp í loft, so skjótt tað kemur oman av hamrinum uppi yvir brøttu líðuni.

- Tá ið áin ikki sleppur oman er nógvur vindur uppi á, ansa eftir tær, meðan tú koyrir suður, sigur Petur, og vit heilsa farvæl.